gult cyan magenta svart








# Tóku av tilboðnum

**Klaksvíkar býráð tók av tilboðnum frá Polytan um at leggja nýtt graslíkið á fótbóltsvøllin í Klaksvík**

GRASLÍKI
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Nú fer borgarstjórin í Klaksvík at skriva undir avtalu við fyritøkuna Polytan, sum skal leggja nýtt graslíkið á fótbóltsvøllin í Klaksvík.

Vøllurin varð skiftur fyri tveimum árum síðani, men hann hevur ikki verið í lagið, tí frárenslið hevur ikki verið nóg gott.

Hetta hevur skapt truplar umstøður, tá tað hevur regnað í Klaksvík, og eitt tað besta minnið um meira ella minni komiskan fótbóltsdyst millum hyljarnar, var tá KÍ vann meistaraskapin á seinasta leikdegi í 1999.



*Klaksvíkar býráð hevur tikið av tilboðnum um at skifta graslíkið á fótbóltsvøllinum. Arbeiðið skal gerast í summar*

### Skiftur í juli

Klaksvíkar kommuna hevur havt drúgvar samráðingar við Polytan um vøllin, tí kommunan hevur viljað havt nýggjan vøll.

Herfyri varð ein semja gjørd millum partarn, sum inniber, at Klaksvíkar kommuna skal gjalda eina millión fyri nýtt graslíkið. Hetta er ikki fulli prísurin fyri nýggja vøllin.

Týskvøldið var semjan løgd fyri býráðið at taka støðu til, og býráðið góðkendi semjuna. Og tí kann borgarstjórin í Klaksvík nú gera endaliga avtalu við Polytan.

Arbeiðið at skifta vøllin í Klaksvík verður gjørt í juli mánaði, tá fótbóltskappingin er í summarfrí.

Dystirnir hjá KÍ passa soleiðis, at seinasti dystur fyri summarfrítíðina verður á útivølli, og tað sama er galdandi, tá kappingin byrjar aftur eftir summarsteðgin.

Roknað verður við at arbeiðið at skifta vøllin tekur einar tvær ella tríggjar vikur.

# Byggja vatngoymslurnar út

**Klaksvíkar kommuna fer at gera ein vatnbrunn afturat í Ánagjógv**

VATN
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Á býráðsfundi týskvøldið samtykti Klaksvíkar býráð, at ein nýggjur vatnbrunnur skal gerast í Ánagjógv – stutt norðan fyri Klaksvík.

Á hesum staðnum er ein vatnbrunnur frammanundan, men Klaksvíkar kommuna heldur, tað verða neyðugt við einum brunni afturat.

Hetta skal tryggja, at nóg mikið av vatni altíð er at fáa í Klaksvík, og at kommunan altíð kann halda sína avtalu við SEV um lata vatn.

Brunnurin í Ánagjógv letur sóttreinsað vatn til eystara arm og til virkini. Restin av Klaksvík fær vatn frá goymslunum Niðan Horn, men har er vatnið ikki sóttreinsað sum er.

Í løtuni verður eitt reinsiverk gjørt har, so allir klaksvíkingar í framtíðini kunnu fáa sóttreinsað vatn.

Arbeiðið at gera nýggjan vatnbrunn í Ánagjógv fer at kosta 2,2 milliónir krónur, og ætlanin er, at arbeiðið skal setast í gongd í summar.

# Fara at reinsa Ósánna

**Privatir stigtakarar og heilsunevndin hjá Klaksvíkar býráði ætla at fáa Ósánna aftur til heiður og æru. Økið uttan um ánna skal eisini fríðkast**

UMHVØRVI
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Í fleiri ár hava umhvørvis- og trivnaðarfólk í Klaksvík arbeitt við tankanum um at fáa Ósánna til heiður og æru aftur, og nú er hol sett á eitt samstarv við Heilsunevndina hjá Klaksvíkar býráði.

Í løtuni tekur Ósáin, sum rennur mitt gjøgnum býin, ímóti kloakkfrárenslið, og tað ger áina sera skitna, men ætlanin er at reinsa ánna og at fáa síl í ánna aftur.

Málið er »Síl aftur í Ósánna«, og í hesum liggur, at síl skulu hava reint vatn fyri at trívast.

– Tað ræður um at fáa umhvørishugsan millum fólk, og æltanin við Ósánni fer vónandi at skapa ein hugburðsbroyting millum fólk, sigur Abraham Mikladal, sum er ein av stigtakarunum til ætlanina.

### Nógv arbeiði

Klaksvíkar kommuna verður sentralur partur av ætlanini í og við Ósánna, tí kommunan skal millum annað næstu árini leiða kloakkvatnið burtur frá Ósánni, so reint vatn kann renna í ánna.

Síðani skal áin endurskapar í sínum upprunalíki, hon skal breiðkast og dýpast, og nýggjur botnur skal leggjast við sandi.

Harafturat skal økið uttan um ánna fríðkast, og tað arbeiðið skal gera í samstarvi við tey, sum ynskja at luttaka í ætlanini.

Umframt kommununa er ætlanin eisini at fáa skúlarnar og onnur upp í verkætlanina.

– Dreymurin er, at tað skal vera gjørligt at ganga av Sandinum, tvørtur um Eiði, á Borðoyavík og út í Grøv ella út til Víkingatoftirnar uttan at koma í hóslag við ferðslu av nøkrum slagi. Hetta verður eitt hugnaumhvørvið mitt í býnum, sigur Abraham Mikladal.

Í ætlanini liggur nógv arbeiðið, men tað skal gerast yvir fleiri ár. Men úrslitini av arbeiðnum skulu síggjast so hvørt, so umráðið gerast alsamt hugnaligari.

# Frumsýna um eina viku

**Klaksvíkar Sjónleikarfelag ætlar at frumsýna nýggjan leik í næstu viku**

AFTURGONGUR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Í løtuni stríðast leikarar og leikstjóri í Klaksvíkar Sjónleikarfelag við at fáa nýggjan leikin hjá felagnum upp á pláss.

Talan er um klassiska Ibsen-leikin Afturgongur, sum varð skrivaður seinast í 19. øld. Í leikinum eru fimm leikarar, og teir venja í løtuni dúgliga.

Laura Joensen leikstjórar leikinum, og ætlanin er at náa á mál komandi dagarnar.

Enn er frumsýningin ikki endaliga ásett, men ætlanin er, at hon verður síðst í komandi viku.

Leikurin verður sýndur í Atlantis, har Klaksvíkar Sjónleikarfelag heldur til.

# Ótangarnir ikki funnir

**Eingi spor eru eftir tann ella tey, sum gjørdu stórt herverk á fimm bilar í Sandvík næstseinasta vikuskiftið**

HERVERK
*Eyðun Klakstein*

**Sandvík:** Løgreglan í Suðuroy veit framvegis ikki, hvør framdi umfatandi herverk á bilar í Sandvík fyri smáum tveimum vikum síðani.

Herverk fyri nógvar túsund krónur var gjørt á fimm bilar í Sandvík. Bilarnir vóru illa skøvaðir við djúpum skøvum, og bilarnir høvdu eisini fingið onkrar stoytir.

Løgreglan í Suðuroy sigur seg einki ítøkiligt hava fingið at ganga eftir í málinum.

Tað var sera friðaligt í Sandvík hetta vikuskiftið, tí stórur dansur var á Tvøroyri, og tí tykist tað verða trupult at fáa upplýsingar.

Løgreglan sigur seg framhalandi arbeiða við málinum.

# Ungi við tveimum høvdum



*Trøllaungin hevur tvey høvd og ivaleyst eisini ljóta rødd*

Trølla-Pætur hevur nú fingið eitt systkin. Talan er um ein Trølla-unga við tveimum høvdum, sum sá dagsins ljós 10. mars.

Kapping var um, hvussu nógv høvdu ungin mundi fara at fáa, og hesa kapping vunnu brøðurnir Atli og Torbjørn Mikkelsen í Havn. Teir vunnu eitt gávukort frá BR Leikum.

